# Áðrenn vit drukna í EFTA-retorikkinum



EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður

Sera avmarkaðir fyrimunir eru fyri Føroyar í EFTA, og í somu løtu, Ísland ella Noreg leypur inn um ES-garðin, er EFTA ónýtiligt fyri Føroyar, tí fiskivinnan missir sítt kappingarføri. Landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum eigur at halda seg til samgonguskjalið og alt fyri eitt taka upp samband við Europasamveldið fyri at kanna møguleikarnar fyri, at Føroyar gerast partur av ES.

Nú er leyst og liðugt.

Ein bólkur av EFTA-politikarum hevur verið á kurteisisvitjan í Føroyum, og brádliga er so gott sum víst, at Føroyar gerast EFTA-limur. Prát í tveir dagar, og allar forðingar eru ruddaðar av vegnum. Portrið er opið, og nú er bert at fylgja slóðini.

Hetta næstan ljóðar ov gott til at vera satt – og tað er tað eisini.

**Ongin substansur**

Hesar dagarnar, EFTA-fólk hava verið og vitjað, hevur onki verið at hoyrt um, hvat Føroyar veruliga kunnu fáa burtur úr einum møguligum EFTA-limaskapi.

Ongin substansur er umrøddur. Bert einoygt fokus á, at vit skulu vera blíð við útlendingarnar og greiða frá okkum sjálvum. Og so hetta, at vit skulu øll vera samd um tann eina mátan at nærkast Europa.

Sjálvandi skulu vit vera blíð við EFTA-fólkini, men tey, sum fylgja við, vita, at EFTA bert kann geva Føroyum sera avmarkaðar møguleikar at mennast.

**Doyggjandi felagsskapur**

Í fyrsta lagi ber til at staðfesta, at EFTA er ein doyggjandi felagsskapur, tí bert Schweiz og Lichtenstein vilja veruliga EFTA.

Noreg hevur tvær reisir roynt at sleppa sær úr EFTA og inn í Europasamveldið. Í longri tíð hevur Ísland roynt at finna dyrnar inn í ES, og seinastu vikurnar eru íslendskir toppolitikarar harumframt farnir at umrøða ES-limaskap sum eina sannlíka íslendska leið burtur úr ólukkuligu kreppuni har.

Ongin eigur at ivast í, at um annaðhvørt Ísland ella Noreg fara inn um ES-garðaliðið, hava Føroyar onki at gera í EFTA. Stóru kappingarneytar okkara á fiskivinnuøkinum fáa tá avgerandi fyrimun innan fyri ES, og vit missa kappingarføri okkara.

Sostatt er EFTA ein viknandi felagsskapur við ivasomum framtíðarvánum fyri Føroyar. Hetta er ikki júst tað, ið okkara politisku leiðarar eiga at stara seg blindar í.

**Fáir fyrimunir**

Hyggja vit nærri at EFTA, so broytir ein møguligur føroyskur EFTA-limaskapur lítið og onki við verandi atgongd Føroya til tey fýra frælsini í ES: fríur flutningur av vørum, tænastum, kapitali og arbeiðsmegi.

Sagt við øðrum orðum: Yvirskipað gevur EFTA-limaskapur okkum ikki betri atgongd til ES-marknaðin, ið er okkara mest týðandi marknaður.

Vøruflutningurin verður framvegis avmarkaður, tí EFTA kann ikki geva okkum atgongd til EBS (Europeiska Búskaparliga Samstarvið). Bert sjálvstøðugir statir fáa atgongd til EBS. Sostatt skulu t.d. útflutningsfyritøkur okkara framvegis fylgja avmarkandi handilsavtaluni við ES.

Tænastuflutningurin til triðjalond verður betri. Men tað ger ikki, at tænastufyritøkur okkara fáa betri atgongd til tann týðandi ES-marknaðin fyri tað.

Flutningurin av kapitali er ongin trupulleiki sum er, og hann broytist neyvan. Flutningurin av arbeiðsmegi broytist neyvan heldur.

**Tvær leiðir skulu kannast samstundis**

Hóast landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum eftir øllum at døma hevur læst seg fastan í EFTA-rásini, veit hann, at hetta er ikki tað, ABC-flokkarnir hava avtalað um Europapolitikkin.

Í samgonguskjalinum, sum vit skulu halda okkum til, er ásett, at tveir møguleikar fyri at nærkast Europa skulu kannast, báðir um eina leið. EFTA er bert annar av hesum møguleikum.

Hin møguleikin er at nærkast Europasamveldinum, og í samgonguskjalinum stendur, at ein skjótt-arbeiðandi serfrøðingabólkur skal "greina allar møguleikar fyri tilknýti til ES, herundir eisini hvørjar treytir eru fyri at gerast partur av ES".

Við øðrum orðum skal landsstýrið skjótast møguligt taka upp samband við ES til tess at kanna, um og hvussu, Føroyar kunnu gerast partur av ES.

Ikki fyrr enn hetta er gjørt, skal landsstýrið taka støðu til, hvørja leið Føroyar skulu halda.

ES hevur sent Føroyum greið tekin um, at tað ber til at finna eina smidliga loysn fyri, at vit kunnu nærkast ES og fáa munandi betri atgongd til ES-marknaðin.

Landsstýrismaðurin við uttanlandsmálum veit hetta, og hann kundi hóskandi farið til verka so, sum samgonguflokkarnir hava avtalað.

# NØVN



**Føðingar**

9. oktober fekk Fríðálvur eina diddu. Hon var 49 cm. long og vigaði 2850 gr. Foreldrini eru Jóhanna og Sjúrður Klakk, Klaksvík.

5. oktober fingu Jakoba Bech og Jaspur Bjartalíð, Strendur, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2480 gr.

7. oktober fingu Marjun Weihe Thomassen og Poul Christoffur Thomassen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

7. oktober fingu Jónvør Danielsen og Sonnie Bjarnason, Ljósá, Fuglafjørður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

10. oktober fingu Terja Jensen og Bjartur Andreasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

10. oktober fingu Lív Nolsø og Beinir Poulsen, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

11. oktober fingu Marna Zachariasen og Hans Terji Joensen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.

12. oktober fingu Sólrun og Egin Fríði Ørvarodd, Sandur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

14. oktober fingu Oddvá og Mortan Hansen, Nes, eina dóttur. Hon var 56 cm. lng og vigaði 4400 gr.

14. oktober fingu Guðrun Justinussen og Símun Kerá, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

**60 og 70 ára dagur**

Leygardagin 18. oktober halda systkini Anna Sofía Petersen og Heini Nielsen, Sandavági, 60 og 70 ára fø›ingardag saman í SÍF-húsinum fra kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**85 ára føðingardagur**

22. okt. verður Brynhild Jensen, Sumba 85 ár. Føðingardagurin verður hildin í Samkomuhúsinum í Sumba leygardagin 18. okt. frá kl. 13 til 18. Opið hús, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**

Leygardagin 18. oktober kl. 16 giftast í Vesturkirkjuni Kathrina Lindenskov Joensen og Leivur Holm, bæði úr Tórshavn. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Leygardagin 18. oktober kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Leila Lisberg úr Vági og Elian Hansen úr Saltangará. Veitslan verður fyri innbodnum í VB-húsinum kl. 19.00.

# Bryggjan í Vestmanna átta ár

**Vestmanna:** 18. oktober fyllir Bryggjan í Vestmanna 8 ár. Bryggjan er eftir hondini ein av teimum gomlu pubbunum í Føroyum.

Barry Bláhamar, sum er stjóri á Bryggjuni, sigur, at íløgan sum varð gjørd í 2000 var sera stór og vóru vónirnar sjálvandi, at vitjunartalið fór at verða stórt.

Sum við øllum vinnuligum virksemi av hesum slagi, so skal eitt ávíst uppfinsemi til fyri at fáa fólk at vitja og tí verður skipað fyri tiltøkum alla tíðina, fólk hava jú alla tíðini nógv tilboð at velja í, sigur Barry. Nú tað er koyrandi av Viðareiði til Gásadals, er tað ikki longur ein sjálvfylgja, at fólk í nærumhvørvinum velja júst okkum og tí eru vit aktiv við tiltøkum, sigur hann.

Barry sigur, at teir royna av og á at hava ymisk tiltøk, so sum fótbólt á stórskýggja dans, bryggjuquitz, hugnakvøld oa.. Ikki kann annað sigast,enn at hesi kvøld hava verið javnt væl vitjaði. Tað nýggjasta sum er í stoypiskeiðini er, at vit hava keypt eitt karaokeanlegg, sum væntast at koma at koyra áðrenn jól.

Nú leygarkvøldið tann 18. oktober hava vit sett full segl sigur Barry Blahamar. Teir báðir vælkendu tónleikararnir Eyðun og Terji fara at spæla á Bryggjumi, og tá plaga at samlast heilt nógv fólk. Men áðrenn tann stóra dansin byrjar ein spurnarkapping, har ein og hvør kann vera við. Einasta treytin er, at tað max.kunnu vera fimm fólk á hvørjum liði, sigur Barry at enda.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vístu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Johannes Bjørgheim Rasmussen**
Klaksvík
vanliga nevndur Johannes í Grótinum

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Hjartafelagið, og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk tøkk til tykkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Takk til Atla Rasmussen, Hanus Simonsen og Poul Færø fyri troystarrík orð.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Marianna, Maria, Poul Juul og Hjalti við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu, tá kæri beiggi og pápabeiggi okkara

**Sofus Danielsen**
Nólsoy

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Sverra Steinholm, prest, kirkjutænarar, sangarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á B6 fyri tykkara nærveru og umsorgan.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hans Pauli, Leivur og Severin**